# Sovandi risin raknað




*Á sínum fyrsta túri við stýrisvølin hevur Benitez vunnið Champions League - ímóti øllum oddsum*

*Mynd: Reuters*

**Eftir 21 ára oyðimarkargongd hevur Liverpool loksins vunnið seg uppaftur á ovastu rók í Evropa. Liverpool er nú við í tí eksklusiva bólkinum við fimm feløgum, sum hevur fingið eitt Evropa Cup steyp til ognar. Við sigrinum hevur populariteturin hjá felagnum aftur fingið vind í seglini**

CHAMPIONS LEAGUE

*Stefan í Skorini*

Í nógv ár hava Liverpool viðhaldsfólk bíðað eftir einum stórum sigri. Felagið hevur ikki vunnið enska meistaraheitið síðan 1990, og seinast tað vann størstu evropeisku kappingina var í 1984. Tað var tí í tøkum tíma, tá Liverpool mikukvøldið aftur kundi hevja Evropa Cup steypið upp um høvd.

Hóast Liverpool ikki hevur verið millum stórmaktirnar ítróttarliga í Evropa seinastu mongu árini, hevur felagið allatíðina havt ein breiðan skara av viðhaldsfólki kring allan heim.

Liverpool hevur eisini verið limur í tí sokallaða G8, sum telur átta tey ríkastu feløgini í Evropa. Hesa støðu innan fótbóltsheimin vann felagið sær upp ígjøgnum sjeyti- og áttatiárini, tá tætt var ímillum meistaraheitini bæði í Onglandi og úti í Evropa.

Hóast eina relativa sterka støðu á marknaðinum og rímiliga høgar inntøkur, hevur felagið ongantíð megnað at endurvinna trónuna hvørki í Onglandi ella í evropeiskum fótbólti.

Manchester United og Arsenal hava seinastu tíggju árini havt eitt kvørkratak um ta ensku Premier League (undantikið í ár, tá Chelsea vann), og Liverpool hevur øll árini staðið í skugganum av hesum báðum feløgum. Okkurt hissini steyp er tó komið í skápið hesi seinastu árini við sigrum í FA-Cup, Liga Cup og UEFA Cup.

## Gyltu árini

Stórheitstíðin hjá Liverpool var í sjeyti- og áttatiárunum. Frá miðskeiðis í sjeytiárunum og næstu tíggju árini vann Liverpool seg fram í elituna í evropeiskum fótbólti.

Fýra ferðir innanfyri átta ár vann Liverpool Evropa Cup, sum tað tá kallaðist, og frá 1975-90 vann felagið tíggju ensk meistaraheiti. Við leikarum sum Kevin Keegan, Kenny Dalglish og Graeme Souness gjørdist Liverpool mest vinnandi felag í Onglandi og er tað framvegis hóast soltnu nítiárini.

Tað var annars tann legendariski venjarin Bill Shankly, ið legði grundarsteinin, tá hann fyrst í sekstiárunum syrgdi fyri, at Liverpool aftur gjørdist fast inventar í fremstu deildini, og hann førdi einini nøkur meistaraheiti aftur til Anfield.

## Stígur kom í

Men so kom stígur í hjá Liverpool, og hetta er fyrstu ferð síðan 1990, at Liverpool kann lyfta eitt av teimum stóru steypunum - um vit ikki taka FA Cup við.

Fleiri orsøkir kunnu vera til tess, og ein av teimum er, at ensk feløg ikki sluppu at luttaka í evropeiskum kappingum í fimm ár. Hetta bannið varð sett í verk av UEFA eftir vanlukkuna á Heysel í 1985, tá 39 viðhaldsfólk hjá Juventus doyðu í sambandi við ófrið undan Evropa Cup finaluna millum Juventus og Liverpool.

Tað var øllum greitt, at altjóða fótbóltur hevði ment seg nógv hesi árini, tá ensku feløgini høvdu leikbann í Evropa. Tí vóru tey ensku feløgini nøkur fet aftanfyri, tá tey einaferð sluppu við aftur. Hetta var serliga eyðsýnt í nítiárunum, tá enskur